# Ljósið skal gera streym í Vestmanna

**Ein roynd at gera elektriskan streym burtur úr dagslýsinum byrjar í Vestmanna fyrsta dagin. Ljóskyknurnar komu til Vestmanna mánadagin og verða sýndar fram fyri almenningunum ein av fyrstu døgunum**

EL-FRAMLEIÐSLA
*Edvard Joensen*



*Í Vestmanna hevur elektrisku streymur í ein mansaldur verið vunnin úr vatninum, sum rennur úr fjalli í hav. Nú fara vestmenningar eisini at leggja tak til el-framleiðslu úr dagins ljósi. Sólkyknur verða settar á takið á ítróttarhøllini, sum sæst uttast til vinstru á myndini*

*Mynd: edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Farið verður fyrsta dagin undir eina verkætlan, sum skal framleiða elektriskan streym burtur úr dagslýsinum. Royndin verður gjørd í Vestmanna.

Gongur tað sum ætlað, verður tað ikki bara vatnið, sum í framtíðini fer at gera elektriskan streym í Vestmanna. Nú skal eini tann ljósi dagurin fáa málaran í skúlanum at mala, sigur Finnbogi Joensen, umsjónarmaður við Vestmanna skúla.

Ljóskyknur, sum skulu fanga ljósið um dagin, verða settar upp á takið á ítróttarhøllini í Vestmanna, og burtur úr teimum skal so elektriskur streymur gerast.

Finnbogi Joensen, sigur, at tað var Kári Thomsen, arkitektur í Havn, sum hevur gjørt nógv burtur úr umhvørvinum, sum fyri nøkrum árum síðan fekk hugskotið at seta upp ljóskyknur til at framleiða elektriskan streym burturúr. Hann reisti málið fyri Oljumálaráðnum, sum umsitir umhvørvismál, og har var beinanveg undirtøka fyri at royna hetta. Vestmanna skúli, sum er ein grønur skúli, vaðr valdur út at verða royndarstøð, greiðir Finnbogi Joensen, umsjónarmaður í Vestmanna, frá.

Hann leggur dent á, at hesar hesar sólkyknurnar, sum her verða brúktar, skulu ikki blandast við teir sólfangararnar, sum brúktir verða til eitt nú at hita vatn. Tað er hvør sítt, sigur Finnbogi Joensen.

Hann greiðir frá, at talan er um tvey sløg av sólkyknum, sum settar verða upp á takinum á ítrótarhøllini í Vestmanna. Takið á ítróttarhøllini er vælegnað, tí tað er stórt, og góðir møguleikar eru fyri útbygging, um tað vísir seg, at tiltakið eydnast.

Av teimum vanligu sólkyknunum, sum fleiri fólk kenna frá eitt nú lampum heima í urtagarðinum, verða settir átta fermetrar upp. Síðan er eisini eitt nýtt slag av sólkyknum komið fram seinnu árini, sigur Finnbogi Joensen. Her er talan um eitt slag av dúki, sum brúkt verður. Og av hesum verða 25 fermetrar settir upp á takinum á ítróttarhøllini í Vestmanna.

Onkur undrast kanska á, um tað nú er rætta staðið at royna slíkt í Føroyum. Vit tosa jú um sólkyknur, og ikki er sólin tað, vit vanliga síggja mest til her á landi, heldur kanska onkur.

Men til tað sigur Finnbogi Joensen, at sambært serfrøðingunum, hann hevur tosað við, eru Føroyar í grundini sera væl egnaðar til júst slíkar royndir. Tí hóast hetta fyribrigdið verður nevnt sólkyknur, er tað grundini ikki bara sólskinið, sum ger tann stóra munin, hóast tað er gott. Heldur er tað tíðin, tá ljóst er á degnum, sum brúkt verður. So í grundini kundi tað eins væl itið ljóskyknur heldur enn sólkyknur, sigur hann.

Og ljósar tímar hava vit nógvar her hjá okkum. Hesa árstíðina í hvussu er. Men, tekur Finbogi Joensen aftur í aftur, at var tað klárt sólskin, var tað sjálvandi best. Tí best er, tá ljósið er bjart og sterkt, sigur hann.

Sólkyknurnar fara at lata streymin inn á netið hjá SEV, sigur Finnbogi Joensen. Men tað verður kortini so, at Vestmanna skúli fær ágóðan av teirri framleiðslu, sum verður. Tí málari verður settur á, og tann nøgdin, sum sólkyknurnar á takinum á ítróttarhøllini í Vestmanna framleiða, verður so drigin frá aftur samlaðu el-nýtsluni hjá skúlanum, sigur umsjónarmaðurin.

Nýggju sólkkyknurnar komu til Vestmanna mánadagin, og verða sýndar fram ein av fyrstu døgunum. Kanska í dag sum ein annan dag, sigur Finnbogi Joensen. Tær verða vístar fram inni í skúlanum, áðrenn tær verða settar upp, sigur hann. Tað verður lýst alment við, nær hendan framsýningin verður.

## Prentarar 9% meira í løn

Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag hava á fundi 27. apríl undirskrivað nýggjan 2-ára sáttmála, sum gevur prentarunum eina lønarhækking upp á góð 9%, harav er eftirlønargjaldið hækkað við 4,75%, soleiðis at eftirlønargjaldið frá 1. mai 2005 kemur upp á 8%. Harumframt vórðu gjørdar nakrar smávegis dagføringar í sáttmálanum, sigur Føroya Prentarafelag í tíðindaskrivi.

# Fleiri tiltøk í Vágum

**Felagið Vágar fer at skipa fyri ymsum tiltøkum í oynni í summar. Tað fyrsta verður longu hósdagin**

VINNA
*Edvard Joensen*



*Útsýni yvir Hviltkinnavatn og vestur móti Barðinum. Vágar eru sera væl egnaðar til gongutúrar á fjøllum. Náttúran er sera vøkur, og lætt er at ganga.*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Felagið Vágar gjørdi á fundi í farnu viku av at skipa fyri fleiri tiltøkum, sum skulu fáa fólk at vitja oynna. Fyrsta tiltakið verður hósdagin.

Hósdagin 6 mai, sum er dagin fyri dýrabiðidag, fara handlarnir, sum eru limir í felagnum Vágar, at hava leingi opið út á kvøldið.

Eisini onnur tiltøk av tí slagnum verða seinni í summar, sigur Kunningarstovan í Vágum. Eitt nú er fastlagt, at eitt slíkt tiltak eisini verður um Vestanstevnuna, sum í ár verður í Sørvági vikuskiftið 9. til 11. juli.

Tað kemur nógv fólk vestur í Vágar. Kanska serliga í samband við flogvøllin. Og nógv teirra nýta eisini høvið til at avgreiða ymisk ørindi í oynni.

Hesum halda handilsfólk í Vágum, at tey eiga at gera meira burturúr. Eitt nú við Tax Free skipanini til ferðafólk, sum fara av aftur landinum.

Á fundi, sum hildin varð í felagnum Vágum í farnu viku, varð hetta evnið eisini uppi, og varð gjørt av at víðka hesa tænastu í Vágum, soleiðis at fleirir handlar fara at bjóða hesa tænastu til ferðafólkið.

Eisini fer felagið at skipa fyri einum serligum kvinnukvøldi í Vágum tann 2. juni. Og tað veru bókstaviliga kvinnukvøld. Menn hava als ikki atgongd.

Men Vágar er so nógv annað enn handlar og flogvøllur. Eitt nú er oyggin sera væl egnað til gongutúrar. Náttúran er sera vøkur, og lætt er at ganga í oynni. Eisini her er Kunningarstovan í Vágum til reiðar at vegleiða og hjálpa til at finna ferðaleiðarar á slíkum túrum.



Leitistórin hjá Statoil:

# Komandi tvey árini sera avgerandi fyri Føroyaøkið!

**- Tey komandi 2-3 árini verða sera avgerandi fyri Føroyaøkið, bæði við atliti til 1. útbjóðing og 2. útbjóðing. Vit koma í hesum tíðarskeiðnum kanska at síggja feløg fara úr økinum, og hvør veit, møguliga fara vit at síggja okkurt nýtt felag koma inn, um væl veit við**

OLJUFRAMTÍÐ
*Jan Müller*



*Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil Exploration í Føroyum: – Komandi árini verða avgerandi*

Hetta sigur sigur Rúni Hansen, leitistjóri hjá Statoil í Føroyum. Vit hava spurt hann, um tað ikki er trupult í dag hjá tí vanliga føroyinginum at vita akkurát, hvat fyriferst á oljuøkinum. Hevur eitt felag sum Statoil pakkað saman ella arbeiðir tað framvegis hart við økinum ?

– Eg kann siga fyri okkara viðkomandi, so hava vit ikki pakkað saman. Vit hava borað ein brunn, og hann gav ikki tað, sum vit høvdu vónað. Vit kendu tó váðan, so tað var ikki ein støða, har vit stóðu heilt undrandi og gánaðu. Vit fingu tó meira vitan, sjálvt um vit ikki høvdu vónað at skula havt útreiðslur fyri ein heilan brunn fyri at fáa ta vitanina. Men soleiðis er tað nú einaferð innan oljuøkið, og vit hava - ja tíanverri - roynt tað fyrr. Men tó skal sigast, at tað øvugta hava vit eisikni upplivað, nevniliga at rakt við olju, og tað rættiliga ofta. Tað kann hóast alt síggjast á inntøkuni hjá felagnum. Og bæði út frá teimum royndunum vit hava gjørt gjøgnum árini runt um í heiminum, tá vit hava rakt við olju og tá vit ikki hava rakt við, umframt við tí vitan við hava fingið ígjøgnum seismikk o.a. á Føroyaøkinum, hevur gjørt, at vit hava avgjørt ikki at pakka saman á Føroyaøkinum, men heldur at brúka tíð at arbeiða meira við økinum, soleiðis at vit kunnu, út frá bestu sannføring vita, so neyvt tað nú einaferð ber til, hvar vit skulu bora næstu ferð. Vit hava ætlanir um at bora ein brunn afurat á Føroyaøkinum. Nær og hvar tað verður, er ikki avgjørt enn.

– Kann tað hugsast, at tit fara at bora á einum heilt øðrum øki næstu ferð?

– Tað kann hugsast, men einki er avgjørt enn. Vit hava eitt øki longur norðuri, har vit skutu meira seismikk síðsta summar. Á tí leiðini er einki borað enn, og á tí økinum er, mótvegis teimum longri suðuri, har allir brunnar higartil eru boraðir, nógv basalt. Trupulleikin her hevur verið, at við tí seismikkinum, sum áður er skotin á basaltinum, hevur tað verið sera trupult at sæð nakað undir basaltinum. Eg kann siga so mikið sum, at tað sær út til, at tey dataini vit í dag sita við, útfrá tí seismikkinum, ið varð skotin síðsta ár, eru betur enn tey vit áður hava havt. So fara kanska komandi tvey árini at vísa, um dataini, eftir at tey eru viðgjørd, verða so mikið góð, at man tekur avgerð um at bora á leiðini. Um tað verður veruleiki, so er ein onnur avbjóðing har, og tað er at bora ígjøgnum tað harða basaltið. Hetta arbeiða vit eisini við í løtuni, saman við kontraktørum o.ø. Avgerandi

– Vil tað so siga, at tú sært at tey komandi tvey árini at verða sera avgerandi fyri Føroyaøkið?

– Eg vænti, at komandi tvey árini verða rímuliga avgerandi. Loyvini frá fyrstu útbjóðing ganga út um góð tvey ár, og tá skulu vit helst vita, hvar restin av brunnunum skulu borast. Eisini longdu øll feløgini (Statoil, ENI og Anardarko), teirra sokallaðu 9-ára loyvi, sum øll liggja á basaltinum, við tveimum árum síðsta ár, tí tey ynsktu at gera meira arbeiði á økinum.

Og eg vænti ikki, at nakað av feløgunum fer at arbeiða óneyðugt við loyvunum, tí tað kostar nógvar pengar at binda ressoursirnar, sum kanska kundu verið frígivnir til aðrar meira lovandi verkætlanir aðrastaðni sigur Rúni Hansen og vísir á, at 2. útbjóðingarumfar verður nú. – Eg vænti ikki, at føroyskir myndugleikar fáa eins nógv út av 2. útbjóðingarrundu, sum teir fingu í fyrstu útbjóðingarrundu. Í tí 1. útbjóðingini bundu feløgini seg til at bora heilar 8 brunnar. Hetta kann man ikki rokna við í aðru útbjóðing í ár. Tað verða færri – kanska eingir – brunnar man fer at binda seg til, men heldur at gera fleiri seismiskar kanningar o.a. Alt økið sum hesuferð er bjóðað út, er meira ella minni sokallað basaltøkir, og her hava flest feløg heilt einfalt ikki nógv nógva vitan enn – til at átaka sær boriforpligtilsi. Tí skal meira forkanningararbeiði gerast her.

Rúni Hansen vísir á, at man í fyrstu rundu fekk trý ár at gera hesar kanningar í, og so skuldi avgerð takast um, hvat víðari skuldi gerast – um man skuldi bora ella ikki. – So siga vit, at tað sama verður galdandi nú - 2 ellar 3 ára arbeiðsprogramm - so eru vit aftur í 2006 ella 2007. Tí vænti eg, at tey komandi 2-3 árini verða sera avgerandi fyri Føroyaøkið, bæði við atliti til 1. og 2. útbjóðing. Vit koma í hesum tíðarskeiðnum, kanska at síggja feløg fara úr økinum, og hvør veit, møguligt fara vit at síggja okkurt nýtt felag koma inn, um væl veit við. Á einum sokallaðum "frontier" øki, sum Føroyaøkið er, er tað ikki óvanligt, at tað er sera ymiskt, hvussu feløgini síggja uppá tílík øki. Hetta er galdandi bæði á tí fakliga jarðfrøðisliga og ikki minst reint strategiskt.

### Við

– Statoil er fyristøðufelag fyri tvey stór loyvi á Føroyaøkinum og hevur verið sera virkið her. Ætla tit eisini at verða við í 2. útbjóðingarrundu?

– Vanliga taka vit ikki endaliga avgerð um at verða við í eini rundu, fyrr enn heilt stutt áðrenn, men sum landið liggur nú, so verða vit við.

– Onkur hevur hildið, at tað er óheppið við eini útbjóðing nú ?

Tað er ilt at siga, nær tíðin er tann rætta og mest optimala. 18. útbjóðing í Norra hevur júst verið, og tann 22. útbjóðingin á enskum øki er í gongd nú, og har skulu umsóknirnar latast inn fyrst í juni. Og so kemur tann føroyska nú beint aftaná. Og nógv av feløgunum hava sama mannskap til allar hesar útbjóðingarnar, so í so máta er tað kanska ikki heilt av leið. Og so kunnu vit eisini seta spurningin, um størri áhugi hevði verið fyri tí føroyska økinum, um man hevði bíðað eitt sindur við útbjóðingini. Eg veit ikki. Tað er nakað av virksemi í gongd tætt upp at markinum bretsku megin, sum kann hava týdning fyri Føroyaøkið. Umframt avmarkingarbrunnin, ið verður boraður á Laggan gassfeltinum nú, er ætlanin er at bora Cambo brunnin síðst í mai, og beint aftaná tað, uml. juni/juli, verður tann sokallaði Rosebank brunnurin boraður. Hesir báðir liggja heilt upp at føroyska markinum, og verða báðir óiva liðugt boraðir, áðrenn umsóknin til 2. útbjóðing skal latast inn. Og við arbeiðinum á Føroyaøkinum, er einhvør nýggj vitan kærkomin sigur Rúni Hansen, nú dagin fyri at stóra oljuráðstevnan letur upp í Norðurlandahúsinum.

## Eivør og Agnar í Norðurlandahúsinum

KONSERT



Mikukvøldi 5. mai verður forkunnug konsert við Eivør Pálsdóttir og Agnar Lamhauge í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Hetta er fyrstu ferð at Eivør og Agnar framføra á konsert saman, tó at tey bæði koma úr tónleikaumhvørvinum hjá Grót úr Gøtu.

Eivør og Agnar búgva ávíkavist í Íslandi og Danmark, so tað er ikki á hvørjum degi at tey hava høvi at spæla saman, og er konsertin er ein liður í eini venjingarlegu í sambandi við, at tey bæði saman skulu luttaka á einum týskum festivali (http://www.nordischerklang.de) tann 12. mai í ár.

Eivør hevur úr at gera í Íslandi og fríggjadagin hevði hon konsert í Langholtskirkjuni saman við Kór langholtskirkju, har hon var solistur á einum verki, ið tann í Føroyum vælkendi John Højby hevur skrivað. Næsta stóra tiltakið í Íslandi verður á Listahátíð Reykjavíkar har Eivør tann 29. mai er við á einari íslendskari/írskari konsert, ið mætir menn sum Hilmar Ørn og Donald Runny úr Írlandi skriva tónleik til og arrangera. Eivør saman við írskari sangarinnu er høvuðsnøvnini á konsertini. Á veg heim aftur úr Týsklandi hevur Eivør konsert hóskvøldi á Club Revolver í Keypmannahavn.

Agnar livir sítt tónleikalív í Danmark, har hann er við at enda ein konservatoriuútbúgving, samstundis sum hann er nógv upptikin av at spæla kontrabass. Agnar er helst best kendur sum bassleikari í Enekk.

Á konsertini mikukvøldið fara Eivør og Agnar fyrst og fremst at spæla nøkur av løgunum hjá Eivør, men eisini onkur lættari løg verða við á skránni. Eivør syngur og spælir guitar, meðan Agnar leikar upp á kontrabass.

Av tí at konsertin er í Klingruni er tað rættuliga avmarkað, hvussu nógv sleppa inn, men tað ber at ogna sær atgongumerki á 100 kr. í forsølu í Norðurlandahúsinum.

## Nýggjur telduormur í álopi

**Ein nýggjur telduormur er í ferð við at spreiða seg um allan heim, ávara antivirus-serfrøðingar. Sasser ormurin spreiðir seg ikki gjøgnum teldupost, men loypir á telduna bara tú ert á netinum**

TELDUVIRUS
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Sasser eitur nýggi telduormurin, sum nú sníkir seg inn á teldur. Hann spreiðir seg ikki sum vit vanliga kenna tað gjøgnum teldupost - tað er nóg mikið, bara tú ert á alnetinum.

Hesin ormur, sum tó sigst vera óskaðiligur, er serstakliga órógvandi, við tað at hann sløkkir og tendrar telduna ferð aftan á ferð.

Tað eru tær berbaru teldurnar, sum eru mest útsettar, og helst eru longu fleiri milljónir teldur smittaðar. Men sambært fólki frá virusfyritøkum, skuldu teldur við verjuveggi verið tryggar.

Ormurin ber seg at sum Blaster, skannar tilvildarligar IP-adressur og finnur viðkvæmar skipanir. Tá tær eru funnar, kopierar hann seg inn á Windows við navninum, AVSERVE.EXE.

Enn er ikki greitt hvaðani ormurin stavar, men helst er tað ein tannáringur, sum roynir síni kynstur, sigur ein antivirus-serfrøðingur frá fyritøkuni F-Secure við norsku Nettavisen í kvøld.